*KAP. 1.*

# Arbeiði nevndarinnar

Á landsstýrisfundi 1. apríl 1993 samtykti landsstýrið[1] at velja limir í eina nevnd at kanna stýrisskipan Føroya.

Í nevndina vóru valdir:
Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, Hans Trygvi Henriksen, adv. ft., Sjúrður Rasmussen, adv., Bjørn á Heygum, adv., og Annfinn V. Hansen, adv.

Løgmaður boðaði í skrivi 14. apríl 1993 frá, at orsøkin fyri setanini var, at í táverandi samgonguskjali var avtalað, at virkast skuldi fyri nýggjari sjálvstýrislóg, sum skuldi avloysa heimastýrislógina. Ført var fram, at fyri at tryggja, at fortreytir eru fyri slíkari broyting, er neyðugt at fáa greiðu á, hvussu okkara innanhýsis stýrisskipan skal verða, tí núverandi stýrisskipan tykist ikki at virka nóg væl við tí sjálvstýri, vit hava.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini var settur at vera hesin:

1) at kanna og lýsa lógargrundarlagið undir stýrisskipanini og umboðsvaldinum og gera eina metan av, um henda lóggáva er hóskandi longur, herundir arbeiðsbýti millum lóggevandi og útinnandi valdið,
2) at lýsa munin millum landsstýrið sum kollegium og ráðharrastýri,
3) at gera uppskot til stýrisskipan, sum byggir á eitt ráðharrastýri, og í hesum sambandi meta um, hvørji krøv ein tílík skipan setir til umsitingina og kostnaðin av hesum,
4) at lýsa, hvørjar stýrisskipanarreglugerðir neyðugar eru afturat, um Føroyar skulu hava fult sjálvstýri.

Nevndin fekk frá landsstýrinum atgongd til allar upplýsingar málinum viðvíkjandi, og fekk tíðarfrest at lata álit innan 1. oktober 1993.

Eftir ein kunnandi fund 27. apríl 1993 við Maritu Petersen, løgmann, og landsstýrismenninar Berg Jacobsen og Finnboga Ísakson hevði nevndin sín fyrsta fund og skipaði seg við Sjúrði Rasmussen, adv., sum skrivara, og honum var litið upp í hendi at taka sær av leiðsluni fyri arbeiði nevndarinnar.

Nevndin hevur havt 18 fundir.

Kap. 2, samandráttin av álitinum hevur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, gjørt.

Kap. 3, stýrisskipanarviðurskifti Føroya fram til 1940 er skrivað av tveimum ymsum høvundum fyri at lýsa tíðina frá einum søguligum sjónarmiði og frá einum fólkarættarligum sjónarmiði. Jákup Thorsteinsson, dr. phil., deildarstjóri í landsstýrinum, hevur skrivað frá einum

[1]. Landsstýrisins j. nr. 105-1/90

søguligum sjónarmiði og Zakarias Wang, stjórnmálafrøðingur, frá einum fólkarættarligum sjónarmiði.

Kap. 4, galdandi stýrisskipan í Føroyum, hevur Sjúrður Rasmussen, adv., skrivað.

Taltilfarið til 5. kap. landskassanum viðvíkjandi hevur gjaldstovan útvegað. Ríkiskassanum viðvíkjandi hevur ríkisumboðið útvegað nevndini tølini. Tølini um uttanlandsskuld Føroya eru úr frágreiðingini hjá Peder Andersen.

At fáa tilvegað tilfar til kap. 9, fremmandar stýrisskipanir, hevur nevndin fingið hjálp frá teim ymsu umboðs- og sendistovunum hjá nevndu londunum.

Kap. 10, bókmentalisti yvir stýrisskipanarviðurskifti Føroya, hevur Føroya Landsbókasavn gjørt eftir umbøn frá nevndini.

Dánjal J. Bærentsen, frv. landsdjóralækni, hevur verið nevndini til hjálpar við rættlestri av føroyska tekstinum, og Arne Juul Arnskov, frv. skrivstovustjóri ríkisumboðsins, hevur rættlisið danska tekstin og veitt nevndini ráð. Jóhan H. Winther Poulsen, professari, hevur rættlisið lógaruppskotið, Maiken S. Poulsen, skrivari løgmans, hevur havt seinasta rættlestur um hendi. Esther Bech, skrivstovufulltrúi á løgtingsskrivstovuni, hevur veitt nevndini upplýsingar um verkliga arbeiðið løgtingsins. Kjartan Kristiansen, menningarstjóri, Zakarias Wang, stjórnmálafrøðingur, Joen H. Andreassen, sorinskrivari, og Árni Olafsson, føroyskur serkønur í uttanríkisráðnum, hava rættleitt nevndini í ávísum spurningum.

Arbeiðið hjá nevndini gjørdist meira umfatandi enn væntað, og av hesi orsøk bar ikki til at halda settu tíðarfrestina 1. oktober 1993, men verður álit nevndarinnar við hesum latið úr hondum.

Tórshavn, hin 22. desember 1993.

*Sjúrður Rasmussen,* adv. *Annfinn V. Hansen,* adv.

*Bjørn á Heygum,* adv. *Hans Trygvi Henriksen,* adv. ft.

*Kjartan Hoydal,* fiskivinnustjóri